# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*20. mars fingu Bjørghild Nolsøe og FróðI Jacobsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.*

13. mars fingu Camilla Baumann og Mike Larsen, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3825 gr og var 53 cm langur.

16. mars fingu Sóleyð Joensen og Sunberg Wang Jacobsen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4100 gr.

16. mars fingu Mary Joy og Dan Kruse Thomsen, Svínáir, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3520 gr.

17. mars fingu Elsa Lamhauge og Hugo Leo, Leirvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3550 gr.

18. mars fingu Maria og Erik Parada, Glyvrar, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3250 gr.

18. mars fingu Bjørg Patursson og John Zachariassen, Vestmanna, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3750 gr.

19. mars fingu Mary Klein og Jákup Petur Juul, Fuglafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3750 gr.

19. mars fingu Súsanna og Guttorm Sundstein Joensen, Amager, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3810 gr.

20. mars fingu Andrea á Rípuni og Tórarinn Niclasen, Kvívík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3150 gr.

## Dagurin

**24. mars. Ulrika**. Teir vita ikki, hvønn hetta halginavnið sipar til. Týska navnið Ulrikus kemur av *uodal*, ið er sama orð sum óðal, *rikus* merkir *eyður*.

**25. mars. Mariumessa um várið**. Til minnis um, at eingilin Gabriel boðaði Mariu Moy frá, at hon skuldi bera frelsaran í heim (Lukas 1, 26-38).
Grikska navnið navnið Maria er tað sama sum hebráiska Mirjam, týdningurin er ókendur.
*Venceslaus Ulricus Hammershaimb varð føddur hendan dagin í 1819.*

**26. mars. Gabriel**. Beint eftir mariumessu er nevndur høvuðseingilin Gabriel, sum bar tey góðu tíðindini.
Navnið merkir *guðsmaður*.

**27. mars. Kastor**. Tær gomlu søgurnar nevna fleiri annars ókend halgimenni, sum itu Kastor og vórðu tikin av døgum 27. og 28.mars.

**28. mars. Eustachius**, deyður umleið ár 625. Abbati í kleystrinum Luxeuil í Fraklandi.
*Victor Danielsen varð føddur hendan dagin í 1894*

**29. mars. Jónas**, deyður umleið ár 326. Tikin av døgum í Persiu.
Navnið merkir *dúgva* ella er kanska ein stuttur formur av Jóannes.

# Heri Mohr 80 ár

Leygardagin 19. mars fylti Heri Mohr í Havn 80 ár.
Heri er havnamaður, sonur Amaliu Mohr (f. Egholm) og Einar Mohr, telegrafist.
Heri vaks upp á Skansagarði úti á Reyni, men sum stórur smádrongur flutti hann við familiuni í nýggju húsini yviri við Strond - tað einasta húsið sum var har um leiðир tá.
Undir krígnum bleiv húsið tikið av eingilsmonnmu, og búðu tey Undir Pisuvarða øll krígsárini.



Heri hevur arbeitt sum roknskaparmaður stóra partin av sínum lívi, hjá Thomas Dam, Wenzel Petersen, og Leif Waagstein. Í 1957 byrjar hann at arbeiða á Føroya Gjaldstovu sum roknskaparleiðari, seinni bleiv hann fulltrúi. Í 30 ár arbeiddi Heri sum tænastumaður, og í 1987 gjørdist hann stjóri á Føroya Gjaldstovu og var har til 1. november 1991.
Heri giftist við Maritu Pálsdóttir Hansen, úr Gøtu, í 1950. Tey eiga 5 børn: Sigrún, Biritu, Tordis, Maluna og Gunnar. Eisini eigur Heri dóttrina Lis. Marita og Heri eiga 15 ommu- og abbabørn og 4 langommu- og langabbabørn.
Heri hevur havt stóran áhuga fyri Havnar Bóltfelag. Hann var við til at endurstovna HB-stuðlar og sat har sum kassameistari í nógv ár. Í HB-stuðlum er hann gjørdur heiðurlimur fyri sítt stóra arbeiði har.

# Jógvan Ki Jacobsen 80 ár



*Jógvan Ki Jacobsen við heiðursbrævinum frá Havnar Badmintonfelag, HBF*

Fríggjadagin 18. mars 2005 fylti Jógvan Ki Jacobsen í Havn 80 ár, og dagin eftir bleiv hann útnevndur til heiðurslim í Havnar Badmintonfelag (HBF), har hann enn er virkin.
Jógvan er føddur og uppvaksin í Havn og útbúgvin maskinsmiður. Tá ið hann í sínum arbeiði sum maskinsmiður hjá Wenzel Petersen var við at byggja Føroya Banka-bygningin í N. Finsensgøtu síðst í 50-unum, førdi tað við sær, at hann varð settur í starv sum hitameistari hjá bankanum í 1957. Seinni bleiv hann húsavørður, og eftir tað tók hann sær av postinum og arkivinum hjá bankanum. Føroya Banki bleiv hansara lívsstarv, og hann gavst har sama dag, sum hann fylti 67 ár, í 1992.
Jógvan er kanska mest kendur sum ítróttarmaður. Hann er ein fyrimynd innan føroyskan ítrótt. Til dømis spældi hann í 1. deild hjá B36, til hann var umleið 40 ára gamal.
Hóast álvarsama sjúkralegu fyri umleið 13 árum síðan, tá hann misti annað lunga, merkist tað ikki á honum í dag. Hann spælir t.d. badminton tvey kvøld um vikuna. Eisini spælir hann tennis, og um summarið gongur hann túrar í fjøllunum. Hann er ótrúliga fimur og skjótur, hóast hann nú er vorðin 80 ára gamal.
Foreldrini hjá Jógvani vóru Johanna Súsanna, f. Joensen, ættað úr Árnafirði, og Christian Jacobsen, vanliga nevndur Ki hjá Bøkjaranum, úr Havn. Harfrá kemur millumnavnið hjá Jógvan, Ki.
Jógvan er giftur við Winny, f. Meitilberg, úr Havn, tey eiga tvey børn, Høgna sum býr í Havn, og Unn sum býr í Barcelona í Spania. Winny og Jógvan eiga tvey ommu- og abbabørn í Barcelona, har Jógvan inn ímillum styttir sær um stundir við at hyggja at fótbóltsdysti á "Camp Nou" stadion í býnum.

### 80 ára føðingardagur

28. mars verður Lis Nolsøe, Klaksvík, 80 ár.
Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Gullbrúdleyp

Páskadag, 27. mars, kunnu Sigga og Ingolvur Andreassen, Norðskáli, halda gullbrúdleyp.
Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Silvurbrúdleyp

29. mars kunnu hjúnini Annika og John Heinesen, Klaksvík, halda silvurbrúdleyp.
Vælkomst verður frá kl. 17.00 í heiminum í Mylnugøtu 4.

### Brúdleyp

Skírisdag kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Linda Meyer, Trongisvági, og Heðin Hansen, Vági.
Veitslan verður fyri innbodnum í Tvøroyrar klubba.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum mintust okkum á diamantbrúdleypsdegnum tann 25. februar 2005.

Tøkk fyri gávur, telegramm og uppringingar, bæði her í Føroyum og úr útlandinum.

Tøkk til tykkum mongu, sum stukku inn á gólvið og settu tykkara serstaka dám á dagin. Eisini ein tøkk til tykkum mongu, sum á ymiskan hátt rættu eina hjálpandi hond.

Ein serstøk tøkk til børn, svigarbørn, ommu- og abbabørn og langommu- og langabbabørn fyri, at tit gjørdu tað møguligt at halda dagin á ein slíkan hátt.

Gleðiligar páskir øll somul.

**Bestu heilsanir**
**Jovnitha og Hans Jacob Midjord, Lopra**